Til Føroya Løgting, Hoyvík, tann 2. mars 2021

Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 087/2020: Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin)

Bóndafelagið skal við hesum koma við viðmerkingum til omanfyri nevnda lógaruppskot, sum vit skilja kemur til fyrstu viðgerð í tinginum í dag.

Fyrst skal verða viðmerkt, at Bóndfelagið stórliga undrast á, at felagið ikki hevur fingið uppskotið til ummælis frá landsstýrinum, tá uppskotið beinleiðis rakar áhugamálini og lendið hjá limum felagsins. Hetta er átaluvert – ikki minst havandi í huga, at Bóndafelagið lat løgtinginum viðmerkingar til løgtingsmál nr. 129/2018, sum er á leið sama uppskot, ið er sett fram fyrr, men uttan at verða samtykt.

Eisni undrast Bóndafelagið á, at innkomnar viðmerkingar til málið, seinast tað var til viðgerðar í tinginum, ikki verða umrøddar í hesum uppskotinum.

Eins og í uppskotinum frá 2019 er tað fyri Bóndafelagið og limir felagsins tann parturin av uppskotinum, sum snýr seg um at kunna gera inntriv í og ognartaka jørð, sum er viðkomandi.

Viðvíkjandi viðmerkingum til fyriliggjandi uppskot verður generelt víst til viðmerkingar okkara frá 30. apríl 2019 til løgtingsmál 129/2018, sum Óðalsfelagið tók undir við, og sum enn eru viðkomandi.

Bóndafelagið skal biðja um at fundarboð, tá málið kemur fyri í nevndini.

Vegna Bóndafelag Føroya

Sigert Patursson, formaður